# nnum peningi



verður við skipunum og soleiðis ei heldur við fiskavirkinum í Vestmanna, sigur borgarstjórin.

**Almenn miðsavnan**

Karl A. Olsen vísir á, at kommunur ikki kunnu taka lut í vinnuvirksemi, og tí kann Vestmanna kommuna ikki gerast partur av einum møguligum keypi av virki ella skipum.

- Okkum dámar lítið, at almennur peningur um Føroyagrunnurin og soleiðis Norðoya Íløgufelag er við til at miðsavna fiskiflotan og fiskiloyvini, sigur hann.

Borgarstjórin vísir á, at skattainntøkurnar hjá Vestmanna kommunu í januar í ár vóru 3% lægri enn í januar í fjør – og fyri februar var talan um eina minking á 5%.

- Eitt er skatturin. Annað er havna-og vørugjøld, sum eisini gerast minni við tað, at skipini ikki leggja veiðina upp í Vestmanna longur.

Karl A. Olsen sigur, at tað sjálvandi er hansara vón sum borgarstjóri og hjá Vestmanna kommunu sum heild, at skipini vera verandi á staðnum – og at fiskavirkið letur uppaftur skjótast tilber.

- Soleiðis, sum vit hava skilt, hevur fiskavirkið í Vestmanna gingið væl, og tí vóna vit eisini, at vinnulívið sær møguleikar í hesum virki – antin verandi eigarar ella onnur, ið eru sinnað at taka um endan. Her hava nógv fólk í nærumhvørvinum havt sítt arbeiði, og mong eru eisini komin úr Vágum til Vestmanna at arbeiða í fiski, sigur borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen.

vilmund@sosialurin.fo



*Prísirnir á hýsu, toski og upsa vóru góðir á marknaðinum fríggjadagin*

# Methøgir fiskaprísir fríggjadagin

**MARKNAÐUR Tey 9 tonsini av hýsu, sum vórðu seld á Fiskamarknaði Føroya fríggjadagin, fingu rættiliga góðan prís. Besti hýsuprísur hendan dagin var nevniliga heilt uppi á 23,40 krónum fyri kilo**

Vilmund Jacobsen

Nøgdirnar av hýsu vóru ikki tær heilt stóru á marknaðinum fríggjadagin, men prísirnir vóru rættiliga góðir.

Góð 600 kilo vóru av hýsu 1, og her var miðalprísurin 19,80. Góð 5 tons vóru av hýsu 2, sum fekk miðalprísin 18,18 krónur fyri kilo.

Leggjast kann aftrat, at besti hýsuprísur fríggjadagin var heilt uppi á 23,40 krónum fyri kilo. Tey 3,1 tonsini, sum vóru av hýsu 3, fingu miðalprísin 17,11.

Hetta eru rættiliga góðir hýsuprísir.

Eygleiðarar siga, at sjálvt gomul trolhýsa, sum vanliga liggur um einar 6 krónur, fríggjadagin fekk umleið 15 krónur fyri kilo.

**Góðir toskaprísir**

Prísirnir á toski á Fiskamarknaði Føroya fríggjadagin vóru eisini góðir. Besti toskaprísur var 20,70, og besti miðalprísur fyri tosk var 19,89, sum var fyri góð 2,3 tons av toski 1.

Sløk 10 tons vóru av toski 5, og miðalprísurin var 10,59 krónur fyri kilo.

**Meiri av upsa**

Størsta einstaka nøgdin á marknaðinum fríggjadagin var upsi, og miðalprísurin fyri upsa lá omanfyri 9 krónur fyri kilo.

Orsøkin til, at meiri upsi er á marknaðinum nú enn áður, er ivaleyst, at fiskurin verður útfluttur heilur og feskur.

Fyri at kunna útflyta heilan fisk, er kravt við lóg, at útflytari skal hava keypsváttan. Tí fer upsi um søluna hjá Fiskamarknaði Føroya, um hann annars skal útflytast feskur og heilur.

vilmund@sosialurin.fo